# Skulu binda frið á páskum og á jólum

**Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum, heldur, at fiskiflotin eigur at verða lagdur nakrar dagar á páskum og kanska á jólum við**

MARKNAÐARRØKT
*Áki Bertholdsen*

Fiskiflotin eigur at liggja á páskum og kanska á jólum við.

Tað heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum.

Hann sigur, at Hann sigur, at hetta hava norðmenn havt í nøkur ár.

– Í fyrstuni vildu teir treyðugt góðtaka tað, men nú hava teir vant seg við tað og tað eiga vit eisini at gera hjá okkum.

Henrik Old sigur, at orsøkin til at hann vil hava flotan lagdan á páskum, er at ofta eru prísirnir lágir um tað mundi.

– Búskaparliga er tað tískil rættari at gevast nakrar dagar fyrr uppundir páskir, ímeðan prísirnir enn eru høgir. Tað vanliga er, at á páskum fella prísirnir mundandi og tað kann tykjast eitt sindur øvugt at oysa fisk á marknaðin, tá ið prósurin er so lágur.

At oysa fisk á marknaðin, tá ið prísurin er lágur, førir aftur við sær, at marknaðurin mettast og at tað gongur lutfalsliga leingi at fáa prísirnar upp aftur.

Formaðurin í vinnunevndini hevur sjálvur royndir av hesum í norðsjónum, har hann fiskaði sild.

– Vanliga plaga vit at avreiða eini 300 tons um vikuna uppundir páskir, men prísirnir bara fullu og fullu og at enda fiskaðu vit ikki fyri útreiðslur.

Ti avmarkaðu danir fiskiskapin beint fyri páskir og løgdu flotan í nakrar dagar. av at halda aftur og avreiddi bara 125 tons um vikuna.

Henrik Old sigur, at tað førdi við sær, at prísurin rættiliga skjótt kom uppaftur á vanliga støði, so at teir í veruleikanum fingu at kalla líka nógv burturúr at avreiða 125 tons hesa tíðina, sum teir annars plagdu at fáa fyri at avreiða 300 tons.



*Fiskiflotin eigur at liggja á páskum og kanska á jólum við. Tað heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum*

Henrik Old sigur, at tað gekk ein tíð, so sá allir flotin tað skilagóða í at avmarka fiskiskapin eitt sindur, tí inntøkan minkaði ikki kortini.

Hinvegin er lítil meining í at fiska matfisk, blóðga og kryvja og arbeiða hann, fyri síðani at avr3eiða hann fyri ein prís, sum liggur langt undir tí vanliga.

– Sostatt er tað ein vinningur fyri allar partar av leggja flotan eitt sindur fyrr á páskum og at steðga á í nakrar dagar á, heldur enn at halda á við fiskiskapinum sum vanligt.

Hann sigur, at á jólum liggur mest sum allur flotin frammanundan, men eisini tá eigur fiskiskapurin at vera avmarkaður.















